ítróttur

Nr. 5 • fríggjadagur • 9. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Noreg-Føroyar 36-24 (16-11):

Ikki tað ringasta

Føroyar taptu sum væntað greitt fyri Noreg, men eina góða løtu vóru okkara væl við í dystinum, og talan gjørdist ikki um avhølvingina, sum summi óttaðust

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Nýggi føroyski liðskiparin hevði eisini nýggjan leiklut á vøllinum, men hóast hetta, so komu bæði hann og liðfelagarnir bara heilt væl frá risauppgávuni í Noreg

Tað var ongan tíð væntandi, at Føroyar skuldu skala Noreg stórvegis, tá liðini mikukvøldið leiktu fyrra undankappingardystin sínamillum.

Sum tað hevur verið nevnt fleiri ferðir seinastu tíðina, so verður Noreg í løtuni roknað millum tey allarbestu í heiminum, og líka mikið, hvussu stór framstig landslið okkara kemur at gera í framtíðini, so verður tað neyvan nakra tíð soleiðis, at vit fara at lyfta okkum upp á tað støðið.

Vóru við eina løtu

Men tað var langt ífrá alla tíðina, at henda sannroyndin var so øgiliga greið mikukvøldið.

Serliga gekst okkara monnum væl fyrstu løtuna. Í verjupartinum megnaði liðið fyri tað nógva at taka nakað av ferðini av norska spælinum, og við gardarahøgu miðverjuni, sum Føroyar kunnu stilla upp, gjørdist tad tí hampuliga trupult hjá norsku favorittunum at koma til upplagdar skotmøguleikar hesa løtuna.

Tað var tó einki at ivast í, at mótstøðan – nær tað skuldi vera – kundi seta meira ferð á, og tá hetta varð gjørt, tók skjótt at dragna millum liðinin. Eina einstaka ferð megnaðu okkara tó at svara aftur, tá norðmenninir eina løtu tóktist at ómaka sær ov lítið, og við tveimum skjótálopum á rað eydnaðist okkara at javna til 7-7. Stuttligt at hoyra, hvussu norski frásøgumaðurin í sjónvarpinum tað ferðina skeldaði sínar egnu, og helt fyri, at tað var altso for galið, at teir soleiðis gjørdu tvey mistøk á rað í álopspartinum.

Moralurin í topp

Men frásøgumaðurin mundi tó skjótt blíðkast aftur. Eftir hetta var nevnliga ikki stórvegis slingur í valsinum. Serliga í álopspartinum dugdu teir á reyða liðnum væl at taga føroysku verjuna sundur við kvikum spæli og brádligum skiftum í spælrætninginum.

Og sum fráleið, so tóktist eisini greitt, at okkara møddust alt meira í skjóta norska spælinum. Ferðin á føroyska álopsspælinum varð til tíðir sett heilt niður á spáki-tempo, men tað viðvirkaði so til, at okkara hóast alt fingu nakað av luft, ein og mistøkini fækkaðust í tali, tá hetta varð gjørt.

At munurin so kortini vaks stútt gjøgnum størsta partin av seinna hálvleiki, var ikki annað enn væntandi, og tað skal so á ongan hátt lastast okkara monnum. Teir stríddust allir sum ein allan dystin á tamb, og at tapa greitt fyri einum liði, sum er somikið nógv sterkari, verður ongan tíð nøkur skomm. Tvørtur ímóti høvdu flestu av okkara stóran heiður av dystinum, sum í øllum førum prógvaði, at moralurin á liðnum er góður, hóast mótstøðan oftast fær uppgávuna at síggja heilt vónleysa út.

Og at moralurin er góður, sást eisini aftur í, hvussu lítið liðið tóktist merkja til missin av Inga Olsen. Tað er neyvan ov nógv gjørt av, tá sagt verður, at hann er avgjørda snúningspunktið á liðnum, men hóast Halgir Dahl Olesen hevði púra nýggjan leiklut sum bæði spæl- og liðskipari, so megnaði liðið í stóran mun at kompensera fyri hendan missin. Men fyri tað skal sjálvandi vónast, at Ingi verður tøkur leygardagin.

Verjan ikki nóg góð

Hvussu tað so fer at tørna út, tá norðmenn vitja her leygardagin, er so ein onnur søga.

Sjálvur segði norski landsliðsvenjarin eftir dystin, at hann sum so var nøgdur við álopspartin – tó at ferðin ikki var so stór – men at hann helt tað vera ov galið, at Føroyar fingu 24 mál. Hvørt tað so merkir, at norsku risarnir fara at leggja meira fyri leygardagin, ber illa til at vita, men hinvegin er okkara lið kanska eisini betri fyri til ta tíð, so vit fáa at síggja.

Rútmukappingin 25. jan. 2004

Hevur tú áhuga í rútmu og fimleiki? Seinasta freist at melda seg til rútmukappingina, ið Havnar Fimleikafelag skipar fyri, er 17. januar

FIMLEIKUR
tíðindaskriv

Øll úr 1. flokki og eldri kunnu luttaka - treytað av, at 4-5 luttakarar eru í liðinum. Harafturat kunnu í mesta lagi 2 í liðinum verða við í stórkappingarfimleiki.

Kappingin verður býtt í 4 bólkar: »1. til og við 2. flokkur«, »3. til og við 4. flokkur«, »5. til og við 6. flokkur« og »7. flokkur og eldri«. Eru luttakarar á sama liði í tveimum ymsum bólkum, t.d. soleiðis: Tvær ganga í 4. flokki og tríggjar ganga í 5. flokki skulu tær í bólk 3 (meðan lið har 5 gentur ganga í 4. flokki sjálvsagt fer í bólk 2). Luttakararnir kunnu væl luttaka í fleiri liðum.

Liðini seta sjálv saman fimleikaseriu og skulu hava í huga, at dømt verður eftir: Kroppsburði, hvussu tryggar genturnar eru í venjingunum, samsvar millum tónleik og venjingar og hvussu genturnar fylgjast (gera í takt).

Tónleikinum stendur liðið eisini til at finna - og eiga fimleikararnir at hava í huga, um tónleikurin hóskar til seriuna.

Tilmeldingarseðlarnir skulu vera inni sum skjótast og kappingin verður sunnudagin 25. jan. 2004 í høllini á Stórheyggi. Kappingin byrjar kl. 14.00 við bólki 1. Fyrst við innleiðandi umførum í øllum bólkum, síðani eini finalu í hvørjum bólki.

Nr. 1, 2 og 3 í hvørjum bólki fáa heiðursmerki og heiðursprógv. Øll luttakandi fáa heiðursbræv.

Seinasta freist at melda til er leygardagin 17. jan. 2004. Til ber at geva fimleikaleiðarum í Havnar Fimleikafelag tilmeldingarseðilin, ella lata hann inn hóskvøldið 15. januar 2004 í høllini á Stórheyggi, millum kl. 18.00 og 19.00. Eisini kann hann sendast við telduposti til HF@email.fo.

Reglurnar fyri innihaldi í seriunum standa í faldara, ið Havnar Fimleikafelag hevur latið gjørt. Eru spurningar til innihaldið/-kappingina, verður víst til: HF@email.fo

KOM OG SYNG VIÐ!!

Leygarkvøldið 10. januar 2004 klokkan 19.00, skipar yngra kvartettin í Betesda Klaksvík fyri evangeliskari sangløtu í

MENTANARHÚSINUM Í FUGLAFIRÐI

Á skránni er:
Felagssangur
Kvartettsangur
Filmbrot, drama
Tala

Ókeypis atgongd - Aftaná verður bjóðað til kaffi

ØLL eru hjartaliga vælkomin

Smakkið, og síggið, at HARRIN er góður! Sælur er tann maður, ið søkir sær skjól hjá Honum.

Sálmur 34,9

AEROBIC SPINNING BALLETT

YNDI bjóðar øllum okkurt slag av kropsvenjing. Kvinnum sum monnum, ungum sum eldri, stórum sum smáum, sterkum sum veikum. Kom framvið og fá tær eitt prát.

Byrjað verður aftur MÁNADAGIN 12. JANUAR og halda vit á til MIKUDAGIN 4. APRÍL

AEROBIC

Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag	Leygardag
	19.00 - 20.00 **Trimmari** Oddvør		16.30 - 17.30 **Stepp & Styrki** Kirstin	16.00 - 17.00 **Aerobic/Trimmari** Saranja
18.00 - 19.00 **Aerobic** Kirstin	20.00 - 21.00 **Aeroboxing** Saranja	19.00 - 20.00 **Trimmari** Tórhalla	17.30 - 18.30 **Aerobic** Kirstin	
19.00 - 20.15 **Stepp & Styrki** Kirstin			18.30 - 19.30 **Trimmari** Saranja	

SPINNING

Mánadag	Týsdag	Mikudag	Hósdag	Leygardag
17.15 - 18.15 **Spinn & Trimm** Óluva	17.00 - 18.00 **Spinn & Trimm** Ingrid		17.15 - 18.15 **Spinn & Trimm** Óluva	15.00 - 16.00 **Spinn & Trimm** Rannvá F
19.00 - 20.00 **Spinning** Evald		18.00 - 19.00 **Spinn & Trimm** Tórhalla	18.30 - 19.30 **Spinning** Evald	

KOSTNAÐUR FYRI ALT SKEIÐIÐ: SKÚLANÆMINGAR

1 tíma um vikuna: 450 kr. 20% avsláttur
2 tímar um vikuna: 730 kr. 20% avsláttur
3 tímar um vikuna: 930 kr.

Gjaldast skal við tilmelding ella fyrsta tíma

BALLETT

Byrjað verður aftur mánadagin 12. januar og hildið verður fram til 16. mai

Týsdag	Mikudag	Hósdag
	16.00 - 16.55 8 - 9 ár **Funk** Gunn/Barbara/Gyða	
16.00 - 16.55 6 - 7 ár **Ballett** Gyða/Barbara/Gunn	17.00 - 17.55 10 - 12 ár **Funk** Gunn/Gyða	
	18.00 - 18.55 13 - 15 ár **Funk-Jazz** Rannvá	19.30 - 20.30 16 ár og eldri **Funky** Rannvá K

Kostnaður fyri alt skeiðið fram til 16. mai
6-12 ár: 480,- kr.
13 ár og eldri: 550,- kr.

Tímar verða leigaðir til feløg, fyritøkur og onnur. Ring og tosa við Elsu Mariu.

Tilmelding: Tel 310025 - 312868 - 311311 ella møti bara til tíman

YNDI
v/ Elsu Mariu Bærentsen
Yviri við Strond 21 tlf 311 311
FO-100 Tórshavn far. 213 213
e-mail: yndi@yndi.fo
www.yndi.fo

Leiðari til Frítíðarskúlan á Oyrarbakka

Søkt verður eftir avloysara fyri leiðaran í barnsburðarfarloyvi at byrja skjótast gjørligt.

Á frítíðarskúlanum, sum er fyri børn í Norðskála-Oyrarskúla, 1., 2., og 3. flokki, eru 17 børn frá k. 11.30 til kl. 17.00.

Leiðarin ansar børnunum saman við einum hjálparfólki og fær umframt fyri hetta løn fyri leiðslu, 1/2 tíma pr. barn um vikuna. Starvstíðin er til 1. aug. 2004.

Umsókn við prógvum og viðmælum skal vera Sunda kommunu í hendi seinast mánadagin 26. jan. 2004.

Hava tygum spurningar, eru tygum vælkomin at ringja til kommunuskrivstovuna.

Sunda Kommuna
460 Norðskála
tlf. 422113 · fax 422575
Sundakom@post.olivant.fo

Koyrikort?
Nýggj teoriskeið byrja
mánadagin 12. januar
kl. 17.30 til persónbil
kl. 19.30 til lastbil, trailara og buss
og **týsdagin 13. januar**
kl. 19.30 til motorsúkklu

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

John A. Christiansen, koyrilærari, tel 21 47 75
Stanley A. Olsen, koyrilærari, tel 21 10 99

Jekaragøta 10 • Tórshavn

Veor o Sos alur
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir